# Skal kirkjan liggja?



Móðurmálsvinurin Absalon Absalonsen spyr, sum nýggja kirkjan á Argjum skal liggja. Hann skrivar soleiðis:

Eg veit ikki um omanfyristandandi spurningur hevur við byggifrøði ella málfrøði at gera. Dúgliga hevur verið kjakast í fjølmiðlunum um nýggja kirkju á Argjum í seinastuni.

Ósemja hevur tikið seg upp um, hvar kirkjan skal liggja. Onkur meinti her og annar har, men ein var sera avgjørdur og segði, at fram við ánni skal eingin kirkja liggja. Eg skal ikki leggja meg út í hatta kjakið, men um argjafólk fáa nýggja kirkju, so ynski eg teimum eina kirkju, sum stendur og kemur at standa, um so bæði fjølmiðlafólk og býráðspolitikkarar vilja hava hana at liggja. Hetta er ein keðilig málspilla, sum hevur tikið seg upp. Onkur málfrøðingur átti langt síðani at havt tala at. Ì Danmark liggja bæði hús og borgir og alt annað við, men í Føroyum hava hús og bygningar staðið í øllum veðri og allar tíðir, men nú skal alt leggjast á liðina. Onkur segði, at Hotel Hafnia liggur á Áarvegnum, tá svaraði ein annar, at so man tað vera nýliga rapað, tað stóð uppi ígjár.



*Fiskavirkisskipanin varð gjørd sum stuðul til tey sum arbeiða á fiskavirkjum okkara, og sjálvt um skipanin verður missbrúkt av nøkrum arbeiðsgevarum, so eigur skipanin ikki at verða avtikin.*



## Hendur ið sleptur tvær ferðir

Greiarøðin »Hendur, ið sleptu«, sum higartil hevur verið í blaðnum hvønn fríggjadag, verður framyvir í blaðnum í tveimum vikuskiftisbløðum í um mánaðin, 1. og 3. vikuskiftið ummánaðin.

# Trúgvi upp á oljufund í Grønlandi



**OLJUVINNA – Og tað hevði verið hugaligt, um olja og gass vórðu funnin í Grønlandi og Føroyum um somu tíð – hvat eg heldur ikki vil útiloka – sigur Hans Christian Olsen, stjóri í almenna grønlendska oljufelagnum NUNAOIL**

Jan Müller

Tað er ikki ómøguligt, at lønandi oljufund verða gjørd í Grønlandi komandi árini, hóast tað vórðu boraðir millum 30 og 35 brunnar bæði í Norðsjónum og í New Foundlandi, áðrenn lønandi fund vórðu gjørd. Hetta heldur stjórin í almenna grønlendska oljufelagnum, Nunaoil, Hans Christian Olsen.

– Vit mugu sjálvandi vera tolin, nú bert fáir brunnar eru boraðir higartil, men eg vóni og eg trúgvi uppá, at tað verða gjørd fund sigur hann og vísir á, at tað kundi verið spennandi og áhugavert, um olja og gass varð funnið í Grønlandi og Føroyum um somu tíð.

Skotska oljufelagið Cairn Energy, sum boraði tríggjar brunnar í vesturgrønlandi í fjør og staðfesti bæði olju og gass, fer at bora tríggjar brunnar aftrat í summar. Hoyrið meira um áhugaverdu og spennandi oljutilgongdina í Grønlandi í morgunsendingini á Rás2 mánadagin kl. 9.15, tá vit fara at senda alla samrøðuna Jan Müller hevur við grønlendska oljustjóran. Í samrøðuni verður eisini tosað um samstarvsmøguleikar á oljuøkinum millum Grønland og Føroyar.

# Eldur í húsum á Raktanga



**ELDUR Tað gekk rímiliga væl hjá Skálafjarðar Sløkkiliði at fáa tamarhald á eldinum, sum var í gamla krúthúsinum á Raktanga, sunnan fyri Strandа bygd, í gjárkvøldið**

Vilmund Jacobsen

Sum skilst, er hetta ikki nøkur krútgoymsla longur, men heldur nakað, sum líkist einum summarhúsum. Talan er um tveir eigarar, har annar eigarin hevur køk og onkur rúm í einum parti, meðan hin brúkar sín part til goymslu av eitt nú reiðskapi.

Sunleiv Højgaard, sløkkiliðsleiðari hjá Skálafjarðar Sløkkiliði, sigur, at teir fingu boð um eldin beint fyri klokkan 22.

– Vit fingu skjótt at vita, at fólk neyvan var í húsinum, men at einar tvær gassfløskur vóru har, sum vit máttu ansa eftir.

Hann sigur, at tað serliga vóru sløkkiliðsmenn av Strondum og Skála, sum vórðu tilkallaðir, men við tað, at vatn ikki er á Raktanga, varð eisini bilur við vatni sendur avstað úr Runavík.

Umframt sløkkiliðsmenn og bilar, var løgregla eisini á staðnum.

– Tað eru vit, sum standa fyri at sløkkja eldin, meðan løgreglan tekur sær av spurninginum um, hví eldur er íkomin.

Sunleiv vísir á, at tað fyrsta, teir gjørdu, tá teir komu á staðið, var at tryggja sær, at eingin var í húsinum og at fáa gassfløskurnar út.

– Eina løtu var eitt sindur av órógvi um, hvørt nakar kortini kundi vera inni, tí onkur av børnunum hjá eigaranum fekk ikki pápan at svara telefonini.

Skjótt varð tó funnið út av, at heldur ikki hann var staddur í húsunum.

Skúrurin hevur flagtekju, og tað vísti seg, at eldur serliga var millum flagtekjuna og loftir undir.

– Her var eitt sindur trupult at sleppa til, og vit noyddust at bróta nakað niður fyri at sleppa fram at, sigur Sunleiv Højgaard, sløkkiliðsleiðari.